umhvørvisstovan

Tórshavnar kommuna
Vaglið
Postbox 32
110 Tórshavn
Føroyar

Argir hin 4. juli 2017
Málsnr.: 16/00521-6
Tykkara málsnr.:
Málsviðgeri: Suni Petersen

**undantaksloyvi at taða oman fyri 250 metrar**

Umhvørvisstovan veitir við hesum, sambært § 8, stk. 5 í kunngerð nr. 87 frá 29. mai 2012 um taðing, Tórshavnar kommunu undantaksloyvi at taða oman fyri 250 metra hædd í í sambandi við niðurlegging av pørtum av tyrvingarplássinum í Húsahaga.

# 1 Umsókn og málsviðgerð

Tórshavnar kommuna hevur søkt um undantaksloyvi at taða á økinum í Húsahaga, ið verður nýtt til tyving og avgrevstur í sambandi við niðurlegging av pørtum av plássinum.

Í umhvørvisgóðkenningini fyri tyrvingarplássið er ásett, at økið skal avsluttast við í minsta lagi 1 metri av mold, og skal gras sáast soleiðis, at minst møgulig broyting er í mun til upprunaliga lendið. Fyri at hjálpa uppá hetta, ynskir Tórshavnar kommuna saman við festaranum av lendinum, at taða so hvørt sum økini verða niðurløgt.

Ein partur av tyrvingarplássinum liggur oman fyri 250 metra hædd, har forboð er fyri at taða sambært §8, stk. 4 í kunngerðini um taðing. Umhvørvisstovan kann tó, sambært 8, stk 5 í somu kunngerð, í serligum førum veita undantaksloyvi at taða oman fyri 250 metra hædd.

Umhvørvisstovan heldur, at tað hevur týdning, at tá slíkt tyrvingarpláss verður niðurlagt, at mold verður løgd omaná og sátt, fyri at økið ikki skal liggja sum eitt sár í lendinum, og at taðing á slíkum økjum kann vera fevnt av §8, stk. 5 í kunngerðini um at loyva taðing oman fyri 250 metra hædd.

Uppskot til loyvi varð sent Tórshavnar kommunu og Júst Rubeksen, festara, Búnaðarstovuni og Náttúrugirpasavninum til ummælis tann 15. juni 2017. Ongar viðmerkingar vóru til uppskotið.

## 2 Treytir

Loyvið verður veitt við hesum treytum:

2.1. Taðast skal bara á økjum, ið hava verið nýtt til avgrevstur og tyrving

2.2. Taðast má einans í sambandi við niðurlegging av einum øki.

2.3. Taðast má einans eina ferð á hvørt niðurlagt øki.

2.4. Nøgdin av tøðum skal í mesta lagi vera 62,5 tons av mykju pr. hektar.

2.5. Í minsta lagi ein mánaða innan taðað verður, skal Umhvørvisstovan fráboðast, har upplýsast skal hvar taðað verður og stødd á lendinum. Eisini skal upplýsast nøgdina av tøðum, ið verða nýtt.

2.6. Ansast skal eftir, at ásetingarnar í kunngerðini um taðing verða yvirhildnar:

- Tøðini mugu ikki dálka áir og løkir nærhendis økinum, har taðast skal
- Taðast skal ikki í regni ella frosti,
- Loyvið er galdandi í 5 ár

## 3 Kæruvegleiðing

Henda avgerð kann kærast til Heilsu- og innlendismálaráðið. Kærufreistin er fýra vikur frá tí degi, avgerðin er fráboðað. Kærur skulu sendast til Umhvørvisstovuna, sum sendir ráðnum kæruna til saman við tilfarinum, sum hevur ligið til grund fyri málsviðgerðini.

Kærur skulu vera Umhvørvisstovuni í hendi í seinasta lagi 2. august 2017.

Argir, hin 4. Juli 2017

Suni Petersen, deildarleiðari

Heidi Mortensen, umhvørvisviðgeri